

Stóra hølið á miðhæddini er prýtt við hópinum av porseleni og gamla pengakassanum, sum upprunaliga bert kundi rokna upp í 99 krónur og 99 oyru

MYNDIR: ÁLVUR HARALDSEN



Ein long røð av gomlu Raadvaad breyðskerarunum eru til sølu. Í dag verða hesir brúktir sum bókahill til kóki- og bakibøkur, ella at skera turra grind og líknandi við



Til móttøkunafegnaðust tvær av stigtakarunum, Ria Torgarð og Marit Holm Petersen, saman við eigaranum av Kathrinu Christiansen, Halldor Christiansen, um, at handilin aftur er komin til heiður og æru

MYND: MARJUN NICLASEN



Á loftinum er hugnalig stova, sum er vælegnað til fundarhøli




Mong minnast gomlu øl- og sodavatnskassarnar frá Føroya Bjór



Gerast fólk í góðum lag, ber til at fara upp á gólv til ein sving-om – tónleikur trítur ikki




Eingin handil uttan eina álítandi vekt. Hendan er ein av teimum snildu, nýggju, sum kann innatillast at vísa kostnaðin við prís pr. kg



Tað ber illa til at fara aftur í tíðina uttan at fylgja tíðarinnar siðum, og tí er royking eisini loyvd á loftinum